# Leiðari til Frítíðarskúlan í Vági

Søkt verður eftir leiðara til nýstovnaða frítíðarskúla hjá Vágs Kommunu.

**Stovnslýsing**
Frítíðarskúlin heldur til í Vágs Skúla.

**Starvið**
Vit bjóða eitt starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum, har leiðarin millum annað kemur:
- At standa fyri tí umsitingarliga og námsfrøðiliga partinum viðvíkjandi stovninum.
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum.
- At leiðarin hevur eitt tætt samstarv við aðrar stovnar og umsitingina hjá Vágs Kommunu.

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at umsøkjarin hevur pedagogiska útbúgving, kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og er førur fyri at taka avgerðir í sínum arbeiði. Eisini er neyðugt at hava innlit í umsiting. Dentur verður lagdur á, at leiðarin kann skapa eitt gott samstarv millum stovnin, børn og foreldur.

**Setunarviðurskifti**
Starvið, ið er 3/4 tíð, verður sett frá 15. august 2002 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmálanum millum Føroya kommunala arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag ella við avvarðandi fakfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 373024.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. juli 2002. Merk umsóknina »Leiðari«.

**Vágs Kommuna**
**Mentunarnevndin**





**STEMPIL OG SKRÚVU KOMPRESSARIR**

**Stationerir og transportablir størri samt smærri**

**Fáast í flestum støddum til øll endamál verkstøð. fiskavirkir, alibrúk, entreprenørar v.m.**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

**Sosialurin** -tað loysir seg


# Starv sum brunaumsjónarmaður

Starvið sum brunaumsjónarmaður fyri Fuglafjarðar sløkkilið, sum er ein deild av Fuglafjarðar kommunu, verður hervið lýst leyst til setan tann **1. september 2002** ella skjótast eftir hetta.

**Krøv:**
- Viðkomandi skal hava handverksliga ella byggifrøðisliga útbúgving.
- Skal hava tikið ella skal taka neyðug skeið sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmanningum og brunaumsjónarmonnum.
- Skal verða við til at menna kommunala brunaverkið og brunamenninar, so sløkkiliðið altíð er á einum tekniskt forsvarligum støði.
- Heilsuváttan verður kravd.
- Skal hava stóra koyrikortið.
- Skal hava góð samstarvsevni.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
- Starvið, sum verður normerað til 15 tímar um vikuna, verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.
- 1. árið verður at rokna sum royndarár.

Skrivligar umsóknir saman við próvskjølum skulu vera **Fuglafjarðar býráð**, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður, í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 2. august 2002 kl. 16.00.**

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Gordon M. Petersen, brunaumsjónarmann, á telefon 220101, ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara, á telefon 444006.

*Fuglafjørður, tann 06. juni 2002*
**Fuglafjarðar býráð**

# Starvsfólk
## til Hvítvørutænastuna

Vegna vaksandi virksemi verður søkt eftir einum fólki at arbeiða hálva ella fulla tíð. Arbeiðsuppgávurnar verða bíleggja eykalutir, móttøka av umvælingum, taka telefon og annað fyrifallandi arbeiði.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góð samstarvsevni. Fyrimun hevur tann, sum hevur arbeitt innan hvítvørutænastu ella líknandi. Koyrikort krevst til starvið.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 15. juni 2002 og skal sendast til:

***Hvítvørutænastan***
v/ Signar Djurhuus
410 Kollafjørður

**Fa. Hvítvørutænastan**
*v/ Signar Djurhuus*
*Líðin, Kollafjørður*
*Tel 42 17 70 - Fax 42 17 75*

# Kunngerð
## frá útskiftingarnevndini í Bø

Útskiftingin innangarðs av Bíggjar bygd varð endað við úrskurði sagdur á fundi í Bø 4. juni 2002. Hesin úrskurður varð latin til ákæru frá sama degi sbrt. kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Sorinskrivaran, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, ið er formaður í yvirútskiftingarnevndini.
Kærufreistin er 3 mánaðir frá 4. juni at rokna.

Á sama fundi var metingin av kommunalu ognartøkuni latin til ákæru sbrt. § 4 í ognartøkulógini frá 07.05.1881.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Sorinskrivaran, C. Pløysensgøta 1, Tórshavn, ið er formaður í yvirmetingarnevndini.
Kærufreistin er 3 mánaðir frá 4. juni at rokna.

Útskiftingarskjølini og metingin liggja frammi hjá kommununi í Bø og á Matrikulstovuni í Tórshavn, til kærufreistin er úti.

**Øssur A. Midjord**
útskiftingarformaður

# Skrivstovufólk

Føroya Barnaheim søkir eftir skrivstovufólkið at arbeiða hálva tíð – fyrrapartin.

Arbeiði fevnir m.a. um: Bankaflytingar, lønir, journalskriving, telefonavgreiðslu og annars alt vanligt skrivstovuarbeiði. Viðkomandi má hava teldukunnleika og duga væl at skriva føroyskt.

Løn eftir avvarandi sáttmála.

Umsókn við avritið av prógvum og møguligum viðmælum, skal stílast til:

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steinsgøta 10 • FO-100 Tórshavn

innan 24. juni 2002.




**Brandt**
**Blomberg**

**Hvítvørur til føroyska húsarhaldið**
** Glas keramikk plátur*
** Yvir- og undirvarma*
** Heita luft*

prísur fyrr 7.995,-
**Nú 6.995,-**

**pf Klement Petersen**
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogar til Stuðulsfólkaskipanina í Tórshavnar kommunu

Stuðulsfólkaskipanin er ein partur av sosialu deild í kommununi, hon hevur egnu umsiting og er skipað í tveimum deildum:

Serdeildin tekur sær av børnum og ungum við varðandi breki, menningartarni o.l. , meðan Familjudeildin tekur sær av børnum, sum hava aðrar trupulleikar.

Søkt verður eftir stuðulsfólkum til báðar deildirnar, 20- 40 tímar um vikuna, 1. august 2002 ella eftir nærri avtalu.

**Størvini**
- Eitt starv 30 tímar um vikuna til ein lítlan drong við Down' syndromi, sum skal byrja í barnagarði.
- Eitt starv 40 tímar á serstovuni í Øksnagerði, sum er eitt serligt tiltak fyri børn við samskiftis- og kontakttrupulleikum. Tú verður partur av einum pedagogiskum toymi, sum arbeiðir miðvíst við at menna samskiftið í einum struktureraðum og visuellum umhvørvi.
- Eisini eru onnur størv 20-30 tímar um vikuna við børnum sum:
  - hava talu- ella samskiftistrupulleikar
  - eru í kreppu
  - hava SI-trupulleikar
  - ikki trívast ella mennast aldurssvarandi
  - eru menningartarnað, hava Down's syndrom e.l.

Arbeiðsstaðið er vanliga á dagstovni, tó eru eisini uppgávur, sum verða loystar heima í familjunum.

**Vit kunnu bjóða**
eitt spennandi og mennandi starv, har tú bæði arbeiðir sjálvstøðugt og ert partur av einum bólki av starvsfelagum. Eisini hevur tú fast samband við pedagogiskan ráðgeva.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tú hevur námsfrøðiliga útbúgving, men verður størsti denturin lagdur á at tú:
- hevur royndir við børnum og innan tað sosialpedagogiska arbeiðsøki.
- hevur hug og evni at arbeiða við børnum og familjum við serligum tørvi.
- er búgvin, kann arbeiða sjálvstøðugt og er opin fyri menning í arbeiðinum.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið kann verða fulla- ella parttíð og verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálastýrið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.
Skipað verður fyri ráðgeving og skeiðvirksemi.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Birgit Debess, leiðara á Stuðulsfólkaskipanini ella Eyðun Jensen, deildarleiðara á sosialu deild, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 21. juni 2002. Viðmerk á umsóknina "Stuðulspedagogur".

SNARSKIVAN


**Sosialurin**
www.sosialurin.fo


**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

# Skúlastjórastarv í Vestmanna Skúla

Av tí at eingin umsókjari søkti starvið, verður starvið sum skúlastjóri í Vestmanna Skúla lýst leyst av nýggjum til setanar frá **1. august 2002**.

Skúlaárið 2002/2003 verða 230 næmingar í 10 árgangum í skúlanum. 20 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir skúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal skúlastjórin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið
- vera førur fyri at útinna starvsfólkaleiðslu
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálastýrinum/í Streymoyar skúladømi I við fyribils tænastu í Vestmanna Skúla og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 31.3 og 33.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálastýrinum, skal vera Mentamálastýrinum í hendi **í seinasta lagi 25. juni 2002.**

**Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 - Fax 355055
e-postur: MMS@MMS.fo

*Mentamálastýrið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking.*
*Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

# Limafundur

verður mikukvøldið 12. juni kl. 20.00 í hølinum hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu.

Á skránni er politiska støðan. Jóannes Eidesgaard, fløksformaður verður við á fundinum.

**Nevndin**

# Útróðrarbátur til sølu

Sómi útróðrarbátur við allari útgerð til sølu.

**Tlf. 421171 ella 265763**


**FA. Gravsteinar**
Velbastaðvegur 45
Box 336
110 Tórshavn
Tlf. 320370
Fax. 321470
Far. 214270

**Gravsteinar**
**Gravplátur**
**Blómukassar**
**Gravkantar**
**Nýggja áskrift**
**Umvæling**

*Opið:*
*mán-fríggj. 900-1700*
*annars samb. avtalu.*

*Vøruskrá kann fáast!*

Sjónband - 31 77 74

FAROE
LAW

Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við
Eyðfinn Jacobsen,
advokat
ella
Kára á Rógvi,
adv. fulltrúa
um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.fo

Sosialurin -har tað hendir